# Jólagøtan á Reyni

**Mikudagin 23. november fingu vit á Sosialinum høvi at gera samrøður við lyklafólk í Jólagøtuni. Vit vóru og vitjaðu í Jólabýnum, og har er tað at jólakalendarin – Jólagøtan, hjá SVF hevur sínar upptøkur**

JÓLAGØTAN
*Barbara Tausen*

Jólakalendarin í ár er úti á Reyni, og hann eitur Jólagøtan. Lív, sum er vertur í sendingini, gongur hvørt kvøld ein túr í Jólagøtuni og har hendir nógv forvitnisligt. Framvið gøtuni eru sølubúðir við góðgæti, listahandverki, djórum og mongum øðrum. Lív vitjar sølubúðirnar, og í teimum er altíð okkurt at frætta. Tá hon er svong og køld, fær hon okkurt at eta og at hita seg við. Nógv fólk búgva við Jólagøtuna, og tað er ikki hissini søgur tey siga frá, men tey eru eisini nokk so undarlig, so kanska er tað mesta bara tvætl, hvør veit? Jólini eru í hondum, og Lív fær eisini jólagávur, men hetta eru ikki heilt vanligar jólagávur, tí tað eru skúlanæmingar úr øllum landinum, sum hava gjørt tær. Nógv børn spæla og stuttleika sær í jólagøtuni, og onkur teirra dugur eisini at spæla uppá ljóðføri.

Hetta og meira verður at síggja í ársins jólakalendara, sum verður vístur í sjónvarpinum hvørt kvøld klokkan 18.00 frá 1. – 24. desember. Hetta er í sjálvum sær ein søga, hetta er størsta sjónvarpsframleiðsla á árinum. Tað hoyrir eisini til søguna, at Jólagøtan úti á Reyni verður latin Býráðnum, tá upptøkurnar eru lidnar, og so verður jólahýrur allan jólamánaðin, eisini úti á Reyni.

Tey, ið eru við, eru Lív Reinert Kjeld, sum er vertur, Eir í Ólavsstovu og Páll Danielsen, sum hava skrivað jólakalendaran, umframt at tey eisini sjálv spæla við og stjórna, Herluf Sørensen, sum er framleiðari, og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommuna, sum yvirtekur Jólagøtuna, tá upptøkurnar eru lidnar.


*Jólagøtan úti á Reyni*
*Mynd: Barbara Tausen*

### Langir dagar

Umframt at Lív er vertur, gongur hon eisini á læraraskúla. Hon fer í skúla klokkan 8.00 á morgni, skúladagurin endar so um 15.00 – 16.00 tíðina, síðani fer hon beina leið niðan í Jólagøtuna klokkan 16.00. Hetta kann vera eitt sindur strævið og tíðarkrevjandi, men hon sigur við einum smíli, at kortini gongur alt væl, og tá er tað rættiliga stuttligt at vera við. Lív var eisini vertur í fjør, og varð aftur biðin í ár. Spurd, hvussu hon er komin inn í hetta at vera vertur sigur hon, at ein drongur sum hon gekk í flokki við hevði sæð lýsingina um nýggjan vert, og hevði biðið hana søkt. Hon hugdi at lýsingini og søkti, hon slapp so við, og tað er hon rættiliga glað fyri. Lív sigur, at henni dámar sera væl at arbeiða í sjónvarpinum, tað er stuttligt og avbjóðandi. Tá Lív møtir børnum í býnum, hoyrir hon ofta navnið hjá sær koma upp, og tað kemur eisini fyri at tey koma yvir og heilsa upp á hana. Hetta heldur Lív vera sera stuttligt og heilsar teimum aftur við stórum smíli.

### Endiliga kom lív í

Fyrr búðu rættuliga nógv smábørn úti á Reyni, men tey síðstu árini hevur tað verið sera tómt at búgva her úti, sigur ein mamma. Endiliga er lív komið í, nú ganga børn her allan dagin. Hendan mamman tendraði ljós í vindeyguni, og bakaði wienarbreyð til Jólagøtuna eitt kvøldið. Hetta halda tey í Jólagøtuni vera sera stuttligt og eru glað fyri at jólagøtan er so væl móttikin av øllum, og ikki minst fyri øllum teimum sum búgva runt um Jólagøtuna.

### Børnini elska tað

Tá vit mikudagin komu niðan til Jólagøtuna á Reyni, møttu vit fleiri børnum, ið runnu runt í jólagøtuni. Tey leitaðu eftur kalendaratølum, spældu og hugnaðu sær óført. Børnini eru sera villig til at hjálpa til og hugna um Jólagøtuna, siga tey, ið skipa fyri hesum. Sjálv hildu vit, at tað var sera stuttligt at síggja hesi børnini fáa so stóra gleði av hesari Jólagøtuni, og vænta at børnini kring Føroya land vera sera glað fyri hesa sending.

Aftaná upptøkurnar til Jólakalendaran kunna familjur og onnur koma niðan í Jólagøtuna á Reyni at spáka sær ein túr gjøgnum gøtuna, har verður møguleiki at fáa kakao, jólakøkur og mangt annað. Har verður rættiligur jólastemningur í. Hetta verður hvørt vikuskifti í desember.

